Leikrit




# Eingin jolafrítíð - men!

Landsmiðstøðin

# ONGA JÓLAFRÍTÍÐ

Eitt jólaspæl fyri øll.

Tekstur og tónleikur: Leif Maibom

Umsett: Hans Nielsen

Sangirnar hava
Målfryd Glerfoss og Guðrið Trondheim umsett.

Føroyskt prent á teldu:
Kristoffur Olsen.

Kápumynd:
Målfryd Glerfoss.

Teaterforlaget
DRAMA

MEGINFELAG
ÁHUGALEIKARA FØROYA
Postrúm 185, 110 Tórshavn
Tlf. 15624

Donsk útgáva:

Copyright (c) Leif Maibom 1985

Omslagstegning: Edel Jensen

OPFØRSELSRETTIGHEDERNE tilhører Leif Maibom,
Gammelhave 13, Lysabild, 6470 Sydals, tlf. 04 44 46 06

Mekanisk, fotografisk eller anden gengivelse, herunder afskrift af dette skuespil eller dele deraf er ikke tilladt ifølge gældende dansk lov om ophavsret.

ISBN 87 7419 392 9

3. oplag, 1986, hermed trykt i 3000 ekspl.

Trykt af og udgivet på
Teaterforlaget DRAMA, Ladegårdskov, 6300 Gråsten
Tlf. 04 65 11 41

# LEIKARARNIR

VÆTTRARNIR Á LOFTINUM:

NILLI - Tann elsta, størsta og tann klókasta.

NALLI - Tann næst elsta, næststørsta og tann tjúkkasta.

NULLI - Tann næstyngsta, næstminsta og tann erpnasta.

NOLLI - Tann yngsta, minsta og dugir ikki rættiliga at tosa enn.

VÆTTRAMAMMAN

VÆTTRAPÁPIN

VÆTTRAOMMAN

VÆTTRAABBIN

teir fýra gomlu vættrarnir eru klókir og hava nógvar lívsroyndir

SKÚLABØRNINI

LENA

LIS

HANNA

GRETA

HANS

SVENN

NIELS

SOFUS

vanlig skúlabørn (um slík eru til.)

LÆRARIN

JÓLFRÍÐ GRANNBERG

hevur sum barn verið nógv argaður við navninum og kann tí ikki tola jólini.

# 1. PARTUR

Øll løgini í leikinum verða spæld sum "overtura". Pallurin er myrkur, og ljósið veksur líðandi á loftinum. Vættrarnir liggja og sova - teir gomlu snorka. Á vegginum hongur ein álmanakki, sum vísir at tað er 22. december.

Nulli vaknar, setist upp undir seg, geispar, rembir sær og ber eygað við álmanakkan.

NULLI: OY, OY! ER ÁRIÐ SO LANGT ÚTLIÐIÐ?
(vendir sær á og skrykkir í NALLA)
VAKNA NALLI! VIT SKULU UPP!

NALLI: (svøvnspískutur) - HA? FARA VIT OG ETA NÚ?

NULLI: NEI, NALLI, VIT SKULU TIL VERKA NÚ!

NILLI: (er vaknaður av hinum báðum) - TIGIÐ VIÐ TYKKUM!
TAÐ BER IKKI TIL AT SOVA Í HESUM GANGINUM.

NALLI: JÚMEN, TAÐ ER SO LANGT ÚTLIÐIÐ. VIT HAVA TANN 22.

NILLI: (kløkkur) - Á TÚ GÓÐI VÆTTUR! TANN 22.!!
OG VIT SUM SKULDI VERIÐ UPPI TANN 20.

NULLI: JA, LATIÐ OKKUM FARA TIL VERKA!

NALLI: SKULU VIT IKKI ETA FYRST?

NILLI: HUGSAR TÚ ONGANTÍÐ UM ANNAÐ ENN MAT?

NALLI: JÚ, VIÐHVØRT HUGSI EG UM ALT TAÐ, VIT SKULU GERA,
MEN TAÐ ENDAR ALTÍÐ VIÐ TÍ, AT EG VERÐI SVANGUR.

(NILLI, NULLI rista við høvdinum - uppgevandi)

NOLLI: (er nú vaknaður) - LULLA AFTUR!

(Hinir tríggir flenna at lítla beiggja)

NILLI: NEI NOLLI, TÚ MEINAR, AT VIT SKULU SOVA AFTUR!

NOLLI: TAÐ SIGUR EG!

NILLI: JÚMEN, VIT SKULU IKKI SOVA!

NULLI: NEI, NÚ SKULU VIT TIL VERKA!

NALLI: Í ÁR ERT TÚ SO STÓRUR, AT TÚ KANST HJÁLPA OKKUM!

NOLLI: LOLPA VIÐ HVAT?

NILLI: Á, TÚ MEINAR HVAT TÚ KANST HJÁLPA OKKUM VIÐ?!

(NOLLI nikkar)

NULLI: VIT HAVA NÓGV AT GERA, NOLLI!
VIT SKULU PYNTA...

NALLI: ...OG BAKA KØKUR...

NULLI: ...PAKKA JÓLAGÁVUR INN...

NALLI: ...OG **ETA** KØKURNAR...

NULLI: ...OG SKRIVA JÓLAKORT...

NALLI: ...OG KÓKA RÍSINGREYT...

NULLI: ...OG BÍTA JÓLAPAKKAR ÚT...

NALLI: ...OG **ETA** RÍSINGREYT...

NILLI: ...OG MANGT ANNAÐ!
MEN TAÐ MEST UMRÁÐANDI ER, AT VIT SKULU...

NALLI, NULLI: ...HJÁLPA MANNABØRNUM, SO AT TEY FÁA EINI GÓÐ JÓL.

NILLI: JÚST SO!

NOLLI: MAM-BØGN?

NILLI: NEI, TAÐ EITUR **MANNABØRN**!

NOLLI: MAMBØGN IKKI TIL!

NULLI: TRÝRT TÚ IKKI UPP Á MANNABØRN!

(NOLLI ristir avgjørdur við høvdinum)

NALLI: JÚMEN, TEY ERU TIL, NOLLI! TAÐ PASSAR!

NILLI: JÚ, NOLLI, VIT HAVA SJÁLVI SÆÐ TEY!

NULLI: Í FJØR!
NØKUR PLAGA AT VERA BEINT UNDIR GÓLVINUM HER!

NILLI: TEY KALLA TAÐ FYRI SKÚLI!

NULLI: JA, TEY KOMA HER HVØNN DAG VIÐ TEIRRA TASKUM
OG BÓKUM OG BLÝANTUM...

NILLI: ...OG VISKILEÐRUM OG PAPPÍRUM...

NALLI: ...OG **MATPAKKUM**!

NILLI: TÚ SLEPPUR SJÁLVUR AT SÍGGJA UM EINA LØTU!

NULLI: MEN NÚ FARA VIT TIL VERKA!

**SANGUR: BYRJUNARSANGURIN HJÁ NISSUNUM**

NOLLI: SUDDA TEY!

NILLI: TÚ MEINAR,
AT TÚ VILT SLEPPA AT SÍGGJA SKÚLABØRNINI!

NOLLI: TAÐ SIGUR EG!

NULLI: JÚMEN KOM, SO SKULU VIT KIKKA NIÐUR TIL TEY!

NALLI: SKULU VIT IKKI ETA FYRST?

NULLI: NEI, KOM NÚ, NALLI!

(NULLI togar tey yvir hagar tey kunna kaga niður í skúlastovuna. Ongin er inni)

NOLLI: VISSAÐI TAÐ ALTÍÐ!

NILLI: TÚ MEINAR, AT TÚ VISTI TAÐ ALTÍÐ?!

NULLI: TEY **ERU** TIL! BÍÐA BARA, TEY KOMA!

NALLI: JA, TEY ERU HELST VIÐ HÚS ENN OG ETA MORGUNMAT!
(sleikir sær um munnin)

NILLI: TAÐ VAR HEPPIÐ, AT VIT VAKNAÐU Í DAG,
TÍ ANNARS HØVDU VIT IKKI SÆÐ TEY Í ÁR!

NULLI: Á JA, HETTAR ER SÍÐSTI SKÚLADAGUR,
OG SO FÁA TEY JÓLAFRÍ!

NOLLI: LÓLA-FJÍ?

NILLI: NEI NOLLI, **JÓLAFRÍ**!

NALLI: Á, HEVÐI TAÐ VERIÐ VIT, SUM FINGU JÓLAFRÍ!

NULLI: NÚ ERT TÚ BÍTTUR, NALLI!
VIT KUNNU IKKI HAVA JÓLAFRÍ!

NILLI: NEI, HVØR SKAL SO BÍTA JÓLAPAKKARNAR ÚT?

NOLLI: LÓLA-PAKK?

NILLI: NEI, NOLLI, TAÐ EITUR JÓLAP...

NALLI: HÚSSSSSJ!!! NÚ KOMA TEY!

# 2. PARTUR

(Ljósið minkar á loftinum og veksur í skúlastovuni. Stovan er tóm men børn hoyrast uttanfyri. VÆTTRARNIR sita á loftinum og kaga niður, meðan 2. partur verður leiktur. BØRNINI koma tosandi innar í skúlastovuna)

<u>SOFUS:</u> ...EG GLEÐI MEG Í HVUSSU TAÐ ER!

<u>HANS:</u> EISINI EG, VIT HAVA FÓLK ØLL JÓLINI!

<u>SVENN:</u> VIT FARA NORÐUR TIL OMMU OG ABBA,
HAR ER BEST AT HALDA JÓL!

(Dreingirnir eru nú komnir inn í skúlastovuna)

<u>NIELS:</u> TAÐ ER VELDUGT! SÍÐSTI SKÚLADAGUR!

<u>SOFUS:</u> JÓLAFRÍÐ Í 14 DAGAR!

<u>HANS:</u> 14 DAGAR VIÐ DUNNUSTEIK, GRANNGREINUM
OG JÓLAGÁVUM...

<u>SVENN:</u> ...OG MARSIPAN OG MANDLUM OG SODAVATNI...

<u>NIELS:</u> ...OG SMÁKØKUM OG STÓRKØKUM OG GÓÐGÆTI...

<u>SOFUS:</u> OG VÓNANDI KAVA OG SLEÐUM OG SKOYTUM ALLAN DAGIN.

<u>HANS, SVENN,</u>
<u>NIELS & SOFUS:</u> UMMMM...

(Genturnar koma inn)

<u>LENA:</u> HVAT FEILAR TYKKUM?

<u>HANNA:</u> ERU TIT SJÚKIR? VÓNANDI SMITTA TIT IKKI!
EG ÆTLI MÆR IKKI AT LIGGJA Í SEINGINI Á JÓLUM!

<u>LIS:</u> DREINGIR ERU BÍTTIR!

<u>NIELS:</u> Á, VIT SÓTU BERT OG PRÁTAÐU UM JÓLINI - SOLEIÐIS!

<u>GRETA:</u> HVÍ PRÁTA TIT BARA? HVÍ GERA TIT ONKI VIÐ TAÐ?

<u>SOFUS:</u> HVUSSU TÁ?

<u>LENA:</u> VIT SKULU SJÁLVANDI PYNTA SKÚLASTOVUNA!

HANNA: JA, TAÐ ERU VIT ALTÍÐ VON AT GERA SÍÐSTA SKÚLADAG!

NIELS: JÚMEN VIT ÆTLAÐU JÚST AT FARA AT HUGSA UM,
AT KANSKA ÁTTU VIT
AT FARI OG LEITA EFTIR JÓLAPYNTINUM!

GRETA: HYGG, HAR SÍGGJA TIT! BERT PRÁT!

LENA: VIT SKULU IKKI KLANDRAST NÚ!

LIS: NEI, TAÐ SKULU VIT IKKI! SKULU VIT IKKI BYRJA NÚ?

HANS: VIÐ HVØRJUM?

GRETA: VIÐ AT PYNTA!

SOFUS: PÚRA RÆTT! TIL VERKA!

ØLL reisast. LIS kemur við pyntinum)

LIS: HER ER ESKJAN VIÐ JÓLAPYNTINUM!

ØLL savnast um eskjuna, taka pyntið úr og gera viðmerkingar.
Hýrurin er sera góður)

SVENN: HYGGA HJARTAÐ, EG KLIPTI Í FJØR!

LENA: OG HER, HENDAN EINGILIN GJØRDI EG Í 2. FLOKKI!

HANNA: HANN ER PENUR ENN! Á, HATTAR ER MÍTT KRAMARHÚS!
EG KENNI HONKINA AFTUR!

NIELS: HYGG! HVØR VAR TAÐ, SUM DUGDI AT FLÆTTA HJØRTU?

SOFUS: JA, OG HVØR VAR TAÐ, SUM LÆRDI TEG!

BØRNINI heinggja pyntið upp, meðan sangurin verður sungin)

**SANGUR: NÚ KOMA JÓLINI**

LIS: HETTAR RIGGAR HEILT VÆL!

NIELS: HER ER VORÐIÐ HUGNALIGT!

SOFUS: Á, TÚ KANST NÆSTAN LUGTA JÓLINI!

SVENN: TAÐ ER EINKI LØGIÐ...VIÐ HASARI NØSINI!

(SOFUS og SVENN fara næstan til hendurs,
men GRETA støðgar teimum)

GRETA: ONKI KLANDUR! JÓLAFRIÐURIN ER KOMIN.

SOFUS: JA, JA, MEN SVENN ER ALTÍÐ SO FREKUR!

HANNA: HVAT HALDA TIT, AT LÆRARIN SIGUR, TÁ IÐ HAN KEMUR?

NIELS: HANN SIGUR SJÁLVANDI ONKI!

HANS: TAÐ ER IKKI VIST!
HANN VAR IKKI HER Á JÓLUM Í FJØR.

LIS: UM NÚ LÆRARNUM ALS IKKI DÁMAR JÓLINI?

(ØLL sita still)

SOFUS: TVÆTL, ØLL ERU GLAÐ UM JÓLINI!

SVENN: OG LÆRARIN ER SIKKURT SERLIGA GLAÐUR FYRI JÓLINI!

GRETA: HVÍ HELDUR TÚ TAÐ?

SVENN: FYRI TAÐ FYRSTA EITUR HANN GRANNBERG!

(ØLL grína eitt sindur)

HANNA: FYRI TAÐ NÆSTA EITUR HANN EISINI JÓLFRÍÐ!

(Tey grína hart)

SVENN: (spælir) - GÓÐAN DAG HARRA GRANNBARG!
VIT SELJA **JÓLATRØ**.
VILJA TYGUM HAVA EINA REYÐ**GRANN**, GRANNBERG?

LIS: GÓÐAN DAG OG GLEÐILIG **JÓL**-FRÍÐ!

SOFUS: JÚ, HARRA GRANNBERG!
TYGUM HAVA **GREIN** Í TYGARA MÁLI!

(Uttan at BØRNINI hava varnast tað, er GRANNBERG komin inn og hoyrir tað, sum fyri ferts)

GRANNBERG: NÚ ER TAÐ NÓG MIKIÐ!
HVAT Í ALLARI VÍÐU VERÐ HAVAST TIT AT???

HANNA: VIT PYNTA HARRA GRANNBERG!

SVENN: HANNA MEINAR SJÁLVANDI IKKI,
AT VIT PYNTA HARRA GRANNBERG.
HON MEINAR: VIT PYNTA - HARRA GRANNBERG!

GRANNBERG: EG HAVI SAGT TAÐ FYRR:
EG VIL IKKI VERÐA KALLAÐUR HARRA GRANNBERG!
TIT SKULU SIGA: LÆRARIN!

HANNA: ORSAKA, MEN EG GLOYMI TAÐ ALTÍÐ,
HARRA GRANNB...LÆRARIN!

GRANNBERG: SIGIÐ MÆR! HVAT ER HATTAR FYRI FJAS,
TIT HAVA HONGT UPP HER?

SOFUS: (peikar høfligur) - HATTAR ER EITT HJARTA,
OG HATTAR ER EIN EINGIL, OG HATTAR...

GRANNBERG: TAKK!!! EG SKILJI! EIN SKAL SANNILIGA HOYRA NÓGV,
ÁÐRENN OYRUNI BLÍVA TIL KRÓNUR! HATTAR SKAL VEKK!

BØRNINI: Á NEI, KUNNU VIT IKKI SLEPPA? TAÐ ER SO HUGNALIGT!

GRANNBERG: ALT SKAL BURTUR. NÚ!!!

LIS: JÚMEN, JÓLINI ERU Í HONDUM!

GRANNBERG: EG HATI JÓLINI!

HANS: TAÐ ER SO HUGNALIGT UM JÓLINI!

GRANNBERG: EG HATI JÓLAHUGNA!

(Spakuligt og tung í huga, fara BØRNINI at taka jólapyntið niður aftur)

**SANGUR: GRANNBERGS JÓLABLUES**

SVENN: JÚMEN, HARRA GRANN...

(GRANNBERG harkar)

SVENN: EG MEINI, GRANN...GRANN ER SUNT.
GRØNT ER GOTT FYRI EYGUNI!

GRANNBERG: JA, TAÐ ER RÆTT!

GRETA: HARRA GRA...LÆRARIN, FÁA VIT SO ONGA JÓLASØGU?

HANS: OG SKULU VIT IKKI SYNGJA JÓLASÁLMAR Í ÁR?

GRANNBERG: (óður) - NÚ ER NÓG MIKIÐ.
EG VIL IKKI HOYRA EITT ORÐ MEIRI UM JÓLAFJAS.
SKILJA TIT?

NIELS: JA, TAÐ SLEPPUR TÚ EISINI FRÁ.
TÍ TAÐ ER SÍÐSTI SKÚLADAGUR! SO HAVA VIT JÓLAFRÍ!

GRANNBERG: **JÓLAFRÍ**!!! SO TAÐ HALDA TIT.
TIT FÁA ONGA JÓLAFRÍTÍÐ Í ÁR!

BØRNINI: **ONGA JÓLAFRÍTÍÐ**???

GRANNBERG: NEI, ONGA JÓLAFRÍTÍÐ!
OG TAKIÐ SO LESIBØKURNAR FRAM, MEN STILLISLIGA,
TÍ EG HAVI HOYRT NÓG MIKIÐ TIL TYKKUM ÍDAG!

(BØRNINI taka spakuliga bøkurnar upp úr taskunum. Hýrurin er ógvuliga ringur. Ljósið minkar í skúla stovuni og veksur á loftinum)

# 3. PARTUR

(Á loftinum halda tey fýra vættrabørnini tað vera øðiliga synd í skúlabørnunum)

NOLLI: ONTI LÓLA-FJÍ!

NILLI: NEI NOLLI, TAÐ EITUR **ONGA JÓLAFRÍTÍÐ**!

NOLLI: TAÐ SIGUR EG!

NULLI: ONGA JÓLAFRÍTÍÐ!

NALLI: ONGA JÓLAFRÍTÍÐ!

NULLI: TAÐ ER SYND Í TEIMUM!

NOLLI: DERA VIT?

NILLI: TÚ MEINAR HVAT VIT SKULU GERA?

(NOLLI nikkar)

NALLI: VIT MUGU SIGA TAÐ FYRI MAMMU OG PÁPA!

(VÆTTRABØRNINI fara yvir til VÆTTRAMAMMU og VÆTTRAPÁPA, sum enn liggja og snorka)

VÆTTRABØRNINI: (rista í tey) - MAMMA OG PÁPI, VAKNI! KOM UPP!

VÆTTRAPÁPIN: (vaknar og klárnar so við og við) - HA? HVØR? ER TAÐ TIT BØRN? HVUSSU NÓGV ER ÁRIÐ?

NILLI: TAÐ ER TANN 22.!

VÆTTRAMAMMAN: Á TÚ GÓÐI VÆTTUR! ER ÁRIÐ SO NÓGV?
(vendir sær til VÆTRRAPÁPAN)
TÚ VAKNAR ALTÍÐ SO SEINT!

VÆTTRAPÁPIN: JÚMEN, VIT FÓRU NAKAÐ SEINT TIL SONGAR Í FJØR! MEG MINNIST EINAFERÐ AT...

NULLI: BØRNINI NIÐRI Í SKÚLASTOVUNI...

NALLI: ...HAVA FINGIÐ EIN ANNAN SKÚLALÆRARA...

NULLI: ...OG HANN EITUR GRANNBERG...

NILLI: ...JÓLFRÍÐ GRANNBERG.

| | |
|---|---|
| NALLI: | OG HANN VILL IKKI GEVA TEIMUN... |
| NOLLI: | LÓLA-FJÍ! |
| NALLI: | JÚST SO! BØRNINI FÁA ONGA JÓLAFRÍTÍÐ! |
| NULLI: | BARA TÍ AT GRANNBERG KANN IKKI TOLA JÓLINI! |
| VÆTTRAMAMMAN: | TÚ GÓÐI VÆTTUR! FÁA BØRNINI ONGA JÓLAFRÍTÍÐ! |
| VÆTTRAPÁPIN: | KANN TAÐ VERA RÆTT? MEG MINNIST EINAFE... |
| VÆTTRAMAMMAN: | JÚMEN, TAÐ ER STÓR SYND! |
| VÆTTRAPÁPIN: | TAÐ ER IKKI BARA STÓR SYND, TAÐ ER RÆÐULIGT.<br>BEST ER AT VEKJA VÆTTRAABBIN! |
| VÆTTRAMAMMAN: | ...OG VÆTTRAOMMU! |
| VÆTTRAPÁPIN: | JA, OKKURT MÁ GERAST! VAKNA VÆTTRAABBIN! |
| VÆTTRAMAMMA: | VÆTTRAOMMAN KOM UPP! |
| VÆTTRAABBIN: | HA? HVØR? Í ØLL TEY 1000 ÁRINI,<br>EG HAVI VERIÐ VÆTTUR,<br>ERI EG ONGANTÍÐ VORÐIN VAKTUR SO HARÐLIGA! |
| VÆTTRAPÁPIN: | JÚMEN, TAÐ ER TANN 22.! |
| VÆTTRAOMMAN: | HA? ER ÁRIÐ SO NÓGV? |
| VÆTTRAMAMMAN: | JA, VIT HAVA FORSOVIÐ OKKUM! |
| VÆTTRAABBIN: | Í ØLL TEY 1000 ÁRINI, EG HAVI VERIÐ VÆTTUR,<br>HAVA VIT Á HVØRJUM ÁRI FORSOVIÐ OKKUM! |
| NULLI: | BØRNINI NIÐRI Í SKÚLASTOVUNI<br>FÁA ONGA JÓLAFRÍTÍÐ Í ÁR! |
| VÆTTRAOMMAN: | ONGA JÓLAFRÍTÍÐ??? |

(ØLL rista við høvdinum)

| | |
|---|---|
| NULLI: | TEY HAVA FINGIÐ EIN ANNAN LÆRARA! |
| NILLI: | HANN EITUR GRANNBERG! |
| NALLI: | JÓLFRÍÐ GRANNBERG! |
| NOLLI: | ONTI LÓLA-FJÍ! |
| NILLI: | NOLLI MEINAR, AT JÓLFRÍÐ GRANNBERG VIL IKKI GEVA<br>BØRNUNUM JÓLAFRÍ! |

VÆTTRAABBIN: Í ØLL TEY 1000 ÁRINI, EG HAVI VERIÐ VÆTTUR, HAVI EG IKKI HOYRT SO GALIÐ!

(ØLL rista við høvdinum)

NOLLI: DERA VIT?

NILLI: TÚ MEINAR, HVAT VIT SKULU GERA?

NALLI & NILLI: JA, HVAT SKULU VIT GERA?

VÆTTRAMAMMAN & VÆTTRAPÁPIN: JA, HVAT SKULU VIT GERA?

NALLI: VIT ÁTTU AT KÓKA RÍSINGREYT. TAÐ KANSKA HJÁLPUR!

NULLI: NEI NALLI, TÚ HUGSAR BARA UM MAT.

NALLI: (Ristir við høvdunum) - JA!

VÆTTRAPÁPIN: (Við tey gomlu) HAVA TIT ONKI HUGSKOT? MEG MINNIST EINAFE....

VÆTTRAABBIN: EITT HUGSKOT?

VÆTTRAOMMAN: JÚ, VIT KUNNU HUGGJA Í TA STÓRU VÆTTRABÓKINA, HON ER GÓÐ Í RÁÐUM!

VÆTTRAABBIN: EITT FRÁLÍKT HUGSKOT! Í ØLL TEY 1000 ÁRINI, EG HAVI VERIÐ VÆTTUR, HEVUR VÆTTRABÓKINA VERIÐ GÓÐ AT HEITA Á!

NALLI: KOM, VIT FARA AT LEITA EFTIR HENNI!

(NALLI og NOLLI krúpa í ein krók at leita)

NULLI: UM VIT NÚ ONKI FINNA Í BOKINA?

VÆTTRAMAMMAN: JA, HVAT GERA VIT SO?

VÆTTRAPÁPIN: JÚMEN, VIT FINNA OKKURT. MEG MINNIST EINAFE...

VÆTTRAABBIN: Í ØLL TEY 1000 ÁRINI EG HAVI VERIÐ VÆTTUR, HEVUR TANN STÓRA VÆTTRABÓKIN VERIÐ GÓÐ Í RÁÐUM!

(NALLI og NOLLI koma út aftur)

NOLLI: ITTI FINNA!

NILLI: MEINAR TÚ, AT TIT FUNNU HANA IKKI!

NOLLI: TAÐ SIGUR EG!

NALLI: NEI, VIT FUNNU HANA IKKI!

NILLI & NULLI: FUNNU HANA IKKI?

VÆTTRAMAMMAN &
VÆTTRAPÁPIN: FUNNU HANA IKKI?

VÆTTRAOMMAN &
VÆTTRAABBIN: FUNNU HANA IKKI?

(NALLI og NOLLI rista við høvdinum)

VÆTTRAABBIN: Í ØLL TEY 1000 ÁRINI, EG HAVI VERIÐ VÆTTUR, HAVA VIT ONGANTÍÐ FUNNIÐ HANA!

VÆTTRAPÁPIN: MEN, VIT MUGU FINNA HANA! KOMIÐ ØLL OG LEITI!

(ALLIR VÆTTRARNIR fara at leita. Rørslurnar eru sum á teimum gomlu stumm-filmunum)

NULLI: HER ER HON!

NILLI: HON LÁ Í ESKJUNU VIÐ TEIMUM GOMLU JÓLASØGUNUM!

NULLI: Á, TÆR SUM GAMLI LÆRARIN PLAGDI AT LESA FYRI BØRNUNUM!

VÆTTRAMAMMA: Á, TÚ GÓÐI VÆTTUR.
TAÐ VAR GOTT, AT VIT FUNNU HANA!

VÆTTRAOMMAN: KOMIÐ BØRN, NÚ FARA VIT AT LEITA!

(VÆTTRARNIR standa rundan um ommuna, hon setur brillurnar á nøsina og opnar bókina)

VÆTTRAOMMAN: (lesur gjølla)
"HEIMARÁÐ FYRI ALT OV TJÚKKA JÓLASÓS"
"HEIMARÁÐ FYRI VETRARKULDA"
"HEIMARÁÐ FYRI GÓÐA FLESKASTEIK"

(NALLI sleikir sær um munnin)

VÆTTRAOMMAN: "HEIMARÁÐ FYRI OVÁTI Á JÓLUM"
"GÓÐ GOMUL JÓLASPØL"
HER ER TAÐ!
"TREISKIR LÆRARAR"

NULLI: LES HART!

VÆTTRAOMMAN: JA, JA, IKKI SO BRÁÐUR!
"UM EIN TREISKUR SKÚLALÆRARI IKKI VIL GEVA BØRNUNUM JÓLAFRÍ, SO SKULU TIT..."

NULLI: SIG TAÐ NÚ, OMMA!

VÆTTRAOMMAN: IKKI SO BRÁÐUR. "...SO SKULU TIT...
"ARGA HANN..." (Klamsar bókina saman)

VÆTTRAABBIN: ARGA HANN?

VÆTTRAMAMMAN &

VÆTTRAPÁPIN: ARGA HANN?

NILLI, NALLI &

NULLI: ARGA HANN?

NOLLI: AIGA?

VÆTTRABØRNINI: JUHUUUU!!!

VÆTTRAABBIN: Í ØLL TEY 1000 ÁRINI, EG HAVI VERIÐ VÆTTUR, HAVA VIT ARGA SKÚLALÆRARAN!

NOLLI: AIGA...HVØJ?

NILLI: TÚ MEINAR HVØR SKAL ARGA HANN?!

VÆTTRAOMMAN: (Blaðar í bókini) NEI, TAÐ STENDUR ONKI UM TAÐ!

VÆTTRAPÁPIN: MAMMA OG EG ERU HELST OV GOMUL TIL SOVORÐI FJAS! MEG MINNIST EINAFE...

VÆTTRAOMMAN: OV GOMUL? HVUSSU ER SO VORÐIÐ VIÐ ABBA OG MÆR?

VÆTTRAABBIN: I ØLL TEY 1000 ÁRINI, EG HAVI VERIÐ VÆTTUR, HAVI EG VERIÐ OV GAMAL!

VÆTTRAMAMMAN: JÚMEN, SO MÁ TAÐ VERÐA TIT, BØRN, SUM ARGA!

VÆTTRABØRNINI: JUHUUU!!!

(ALLIR VÆTTRARNIR syngja)

**SANGUR: DRILLISANGURIN HJÁ NISSUNUM**

VÆTTRAMAMMAN: TÁ IÐ TIT ERU KOMIN NIÐUR Í SKÚLASTOVUNUA,
MUGU TIT BEINAVEGIN SIGA,
AT TIT ERU KOMIN TIL AT HJÁLPA TEIMUM!

NILLI, NALLI,
NULLI: JA, TAÐ SKULU VIT!

NOLLI: JEP!

VÆTTRAOMMAN: OG TIT MUGU KRÓGVA TYKKUM VÆL!

NILLI, NALLI,
NULLI: JA, TAÐ SKULU VIT!

NOLLI: JEP!

VÆTTRAOMMAN: OG TIT MUGU ANSA EFTIR
AT GRANNBERG IKKI SÆR TYKKUM!

MILLI, NALLI &
NULLI: JA, TAÐ SKULU VIT!

NOLLI: JEP!

VÆTTRAPÁPIN: JA, OG NÚ HYGGJA TIT VÆL EFTIR GRANNBERG,
SO SKJÓTT HANN ER FARIN ÚT UM DYRNAR,
SNÍKJA TIT TYKKUM NIÐUR! MEG MINNIST EINAFE...

NILLI, NALLI,
NULLI: TAÐ SKULU VIT!

NOLLI: JEP!

NULLI: KOM, NÚ FARA VIT AT KAGA NIÐUR!

(Vættrarnir kaga niður í skúlastovuna. Tað verður ljósari har niðri. Tá ið vættrabørnini eru komin niður í skúlastovuna, minkar ljósið á loftinum!)

GRANNBERG: EG FARIÐ ÚT EFTIR NØKRUM ROKNISTYKKJUM TIL
TYKKARA! TIT SIGA STILL ÍMEÐAN!

(GRANNBERG fer)

NULLI: SO FARA VIT!

NALLI: SKULU VIT IKKI ETA FYRST?

NILLI: **NEI**, NALLI, KOM NÚ!!!

(VÆTTRABØRNINI klúgva niður í skúlastovuna)

VÆTTRAMAMMAN: ANSIÐ TYKKUM NÚ!

VÆTTRAOMMAN: JA, ANSIÐ VÆL EFTIR GRANNBERG!

# 4. PARTUR

<u>SOFUS:</u> (sær Nulla og hvøkkur við) - HYGG! EIN VÆTTUR!

(Hini hyggja)

<u>LENA:</u> HAR ERU TVEIR!

<u>HANS:</u> NEI, TRÍGGIR!

<u>HANNA:</u> FÝRA!! KOMA FLEIRI?

<u>NOLLI:</u> FÝA BESJT!

<u>NILLI:</u> NOLLI MEINAR, AT VIT ERU BERT FÝRA! EG EITI NILLI!

<u>NULLI:</u> EG EITI NULLI!

<u>NALLI:</u> EG EITI NALLI!

<u>NOLLI:</u> NOLLI EG!

<u>GRETA:</u> ERU TIT VERULIGUR VÆTTRAR?

<u>NALLI:</u> JA, SJÁLVANDI!

<u>NULLI:</u> HELT TÚ AT VIT VÓRU...**ÚTSTAPPAÐIR**?

<u>NILLI:</u> VIT ERU KOMIN TIL AT HJÁLPA TYKKUM!

<u>NOLLI:</u> GRANNFRÍÐ JÓLBERG!

<u>NILLI:</u> NOLLI MEINAR: JÓLFRÍÐ GRANNBERG!

<u>NIELS:</u> HANN KUNNU TIT ONKI GERA VIÐ!

<u>NULLI:</u> JÚ, BÍÐA BARA!

(Vættrarnir syngja seinasti ørindi í drillisanginum)

**SANGUR: DRILLISANGURIN HJÁ NISSUNUM**

<u>NULLI:</u> VIT MUGU VERA PINNASTILL, ANNARS SÆR HANN OKKUM!

<u>NALLI:</u> JA, OG VIT MUGU KRÓGVA OKKUM VÆL,
ANNARS HOYRIR HANN OKKUM!

<u>NOLLI:</u> ITTI SUDDA!

NILLI: NOLLI MEINAR,
AT TIT SKULU LÁTAST IKKI AT SÍGGJA OKKUM.

LIS: HVAT ÆTLA TIT AT GERA?

NOLLI: LÓLA-SPØL

NILLI: HANN MEINAR,
AT VIT SKULU SPÆLA NØKUR JÓLASPØL VIÐ GRANNBERG!

NULLI: JÚST SO!

NALLI: VIT FARA AT KRÓGVA YMISKT FYRI GRANNBERGI!

(So við og við fata børnini, hvat tað er, sum henda skal, og hýrurin verður betri)

NULLI: EG FARI AT KRÓGVA...BRILLURNAR!

(Skúlabørnini flenna eitt sindur)

NILLI: EG FARI AT KRÓGVA...TASKUNA!

(Tey flenna meir)

NALLI: EG KRÓGVI...MATPAKKAN!

(Í kíki)

NILLI: MEN TÚ MÁST IKKI ETA HANN!

NALLI: HVÍ?

NOLLI: KITIÐ KJEGVA!

NILLI: NOLLI MEINAR, AT...

BØRNINI: ...HANN SKAL KRÓGVA KRITIÐ!

NILLI: EG HOYRI, AT TIT HAVA SKILT TAÐ!

LENA: HÚSSJJ! HANN KEMUR NÚ!

(Skúlabørnini skunda sær upp á pláss. Vættrarnir krógva seg aftan fyri borðini. Nulli loypur upp til lærarabórði og tekur brillurnar hjá Grannberg, og krógvar seg. Tá ið Grannberg er innkomin, sita skúlabørnini alla tíðina og skeita eftir vættrunum og royna at halda sær)

GRANNBERG: JA, NÚ FÁA TIT NØKUR ROKNISTYKKIR!
BÍÐA NÚ, HVAT STENDUR HER?
(Huggur eftir brillunum)
HOYR! HVAR ERU BRILLURNAR?
EG LEGÐI TÆR FRÁ MÆR HER Á BORÐIÐ.
HAVA TIT TIKI TÆR?

HANNA: NEI, HARRA GRANNB...LÆRARIN!

GRANNBERG: NÚ, MEN SO ERU TÆR HELST Í TASKUNI!
(hann hyggur í taskuna)

(í meðan leggur Nulli brillurnar á borðið. Børnini grína)

GRANNBERG: HVØRJUM GRÍNA TIT AT? (sær brillurnar)
HVAT SØRIN, TÆR LIGGJA Á BORÐINUM.
HVÍ SØGDU TIT IKKI TAÐ?
(hann tekur brillurnar á nøsina)

GRANNBERG: NÁ, MEN NÚ SKULU VIT ROKNA! GRETA BÍT ÚT!
(fer oman til Gretu)

(í meðan tekur Nilli taskuna)

GRANNBERG: EG HAVI SVARLISTAN Í TASKUNI!
(setist við pultin og tekur eftir taskuni)

GRANNBERG: HVAT? HVAR ER TASKAN?

(SVENN flennir hart)

GRANNBERG: ER TAÐ TÚ?

SVENN: EG? NEI, TAÐ ERU HELST VÆTTRARNIR?

GRANNBERG: VÆTTRARNIR: SOVORÐIÐ TVÆTL. ONGIR VÆTTRAR ERU TIL!

(Børnini flenna, og NILLI setur taskuna á borðið)

HANNA: HELST IKKI!

GRANNBERG: HALDIÐ SO UPPAT! TAÐ ER ONKI AT GRÍNA AT,
TASKAN ER TIKIN OG...

(NOLLI tekur kritið)

NIELS: JÚMEN, HON STENDUR Á BORÐINUM!

GRANNBERG: (snarar sær á) - Á BORÐINUM?
SIGIÐ MÆR: ER ALT GANDAÐ Í DAG?
EG ERI HELST TROYTT! MEN ROKNA NÚ!
EG SKAL SKRIVA NUMRINI Á TALVUNA! HVAR ER KRITIÐ?

SOFUS: TÚ KANST BARA SKRIVA VIÐ FINGRINUM!

GRANNBERG: HA? HVAT MEINAR TÚ VIÐ?

SOFUS: Á, EG HALDIÐ BARA
AT TÚ ERT BLÍVIN EITT SINDUR FORKÁLKAÐUR?

(Øll flenna í kiki)

GRANNBERG: FRIÐUR. NÚ ER TAÐ OV MIKIÐ!

(Válar aftur og fram. NOLLI gongur aftan fyri hanna og hermir eftir honum)

GRANNBERG: ALT ER GANDAÐ Í DAG. HVAT HENDI MEÐAN ER VAR ÚTI?
SÆTT ER, SUM ORÐATAKIÐ SIGUR:
TÁ IÐ KETTAN ER ÚTI LEIKA MÝSNAR Á BORÐNUM!
ALT HVØRVUR, OG TIT SITA BARA OG FLENNA.
BRILLURNAR, TASKAN, KRITIÐ, HVAT VERÐUR TAÐ NÆSTA?

NALLI: (svingur høvdið fram og teskar) - MATPAKKIN!

GRANNBERG: EG FATI TAÐ IKKI!
HVUSSU KANN EG LÆRA TYKKUM NAKAÐ,
TÁ IÐ EG IKKI HAVI SO MIKIÐ SUM EITT KRIT?
(Hann leggur hendurnar aftur um bak)

(NOLLI leggur kritið í hondina og krógvar seg aftur)

GRANNBERG: JÚMEN, EG HAVI TAÐ Í HONDINA!!! (tekur um høvdið)
NEI, NÚ ORKI EG IKKI MEIRA!
(Hann setist við pultin, heldur um høvdið)

GRANNBERG: EG HALDI, VIT ETA BARA NÚ!

(NALLI siníkjur seg at taka matpakkan)

GRANNBERG: EIN BREYÐBITI VIÐ KJØTI FER AT STYRKJA!
HANN ER BURTUR. Á NEYARS EG. HVAT HAVI EG GJØRT?
OG HVAT KANN EG GERA
FYRI AT FÁA HETTAR AT HALDA UPPAT?

NILLI: (rópar) GEV BØRNUNUM JOLAFRÍ!

GRANNBERG: HA? VAR TAÐ TÚ GRETA?

GRETA: EG? EG HAVI ONKI SAGT?

NALLI: (við pultin) GEV BØRNUNUM JÓLAFRÍ?

GRANNBERG: HVØR ER TAÐ?

NIELS: HVAT TVÆTLAR TÚ, HARRA GRANNB....LÆRARIN?

GRANNBERG: HVØR ER TAÐ, SUM SIGUR,
AT EG SKAL GEVA BØRNUNUM JÓLAFRÍ?

HANNA: EINGIN HEVUR SAGT NAKAÐ! IKKI EITT ORÐ!

SVENN: MEN TAÐ ER NÚ IKKI BÍTT SAGT!

GRANNBERG: HATTAR KEMUR ALS IKKI UPP Á TAL!

NULLI: GEV BØRNUNUM JÓLAFRÍ!

GRANNBERG: HOYR! HAR VAR TAÐ AFTUR!

(BØRNINI rista við høvdinum)

NOLLI: LÓLA-FJÍ

GRANNBERG: HVAT ER HATTAR???

NILLI: HANN MEINAR **JÓLAFRÍ!**

GRANNBERG: HA? HVAT? HVØR?

(Setir seg við hond upp undir kinn, hyggur upp)

GRANNBERG: JA, SO ROYNI EG TAÐ MEÐNI!

NIELS: HVAT ER TAÐ, TÚ SKALT ROYNA?

GRANNBERG: TAÐ SKALT TÚ ALS IKKI BRÍGGJA TEG UM!
MEN...EG...EG HAVI TIKIÐ TA AVGERÐ, AT...
AT TIT KANSKA ALLÍKAVÆL FÁA JÓLAFRÍ Í DAG!

(BØRNINI rópa)

GRANNBERG: NÚ, NÚ, NÚ!!! TAÐ VIL SIGA,
BERT UM EG FINNI MATPAKKAN AFTUR!

(Meðan hann sigur hettar, leggur NALLI matpakkan á borðið)

LIS: JÚMEN, HANN LIGGUR Á BORÐINUM!

GRANNBERG: HA? TAÐ VAR GOTT! EG ERI VORÐIN SVANGUR!

HANS: SLEPPA VIT SO IKKI AT PYNTA AFTUR?

GRANNBERG: PYNTA? IKKI TALAN UM! EG VIL IKKI...

(VÆTTRABØRNINI harka hart)

GRANNBERG: (ørkymlaður) PYNTIÐ SO MEÐNI!

(BØRNINI pynta. GRANNBERG etur. VÆTTRARNIR snikja upp aftur á loftið)

**SANGUR: NÚ ER JÓLINI KOMIN**

(Tá ið sangurin er av, eru BØRNINI liðug at pynta og seta seg niður. VÆTTRARNIR kaga niður)

LIS: HVAR FÓRU VÆTTRARNIR?

(BØRNINI líta seg íkring)

GRANNBERG: HVAT SIGA TIT? VÆTTRARNIR? TEIR IKKI TIL!

HANS: JÚ, TAÐ ERU TEIR!

LENA: JA, UPPI Á LOFTINUM!

SVENN: TAÐ PASSAR. KUNNU VIT IKKI AT RÓPA EFTIR TEIMUM?

GRANNBERG: RÓPA EFTIR TEIMUM? JA, TAÐ KUNNU TIT!

(BØRNINI fara yvir til lemmin)

SVENN: VÆTTRAR!

LIS: KOMIÐ NIÐUR!

NIELS: ALLAR!

(VÆTTRARNIR komma niður, fyrst børnini, sum síðani veittra eftir teimum gomlu. Tey heilsast. GRANNBERG situr bara og gapar)

GRANNBERG: (reistist umsiðir) TAÐ VAR LØGIÐ.
ER HETTAR EIN DREYMUR, ELLA...???
EG HAVI ONGANTÍÐ VITA SLÍKT!

NULLI: TAÐ VAR EG, SUM KRÓGVAÐI BRILLURNAR!

NILLI: OG TAÐ VAR EG, SUM KRÓGVAÐI TASKUNA!

NALLI: OG TAÐ VAR EG, SUM KRÓGVAÐI MATPAKKAN!

NOLLI: KITIÐ EG!

GRANNBERG: OG TAÐ VAR TÚ SUM KRÓGVAÐI KRITIÐ?!

VÆTTRAPÁPIN: SOLEIÐIS ERU VÆTTRABØRN!

VÆTTRAMAMMAN: JA, MEN, VIT ELDRI ERU IKKI STÓRT FRAGARI!

GRANNBERG: SERA LØGIÐ! HASUM HEVÐI EG IKKI ROKNA VIÐ!
MEN SETIÐ TYKKUN NIÐUR.
FLYTIÐ TYKKUM, BØRN SO AT GESTIRNIR KUNNU SESSAST!

(NOLLI situr á læraraborðinum)

VÆTTRAPÁPIN: SIGIÐ MÆR, HARRA GRANNBERG...

GRANNBERG: HAVI EG IKKI SAGT, AT HATTAR NAVNIÐ VIL EG IKKI...
(raknar við aftur) EG MEINI BERT,
AT EG ERI VANUR VIÐ AT VERÐA RÓPT LÆRARI!

VÆTTRAPÁPIN: JÚMEN, TAÐ, SUM EG VILDI SIGA VAR,
AT TYGARA NAVN GRANNBERG, ER EITT GOTT VÆTTRANAVN!

GRANNBERG: NÚ, SO?

VÆTTRAMAMMAN: JA, MÍN TIP-TIP-TIP-VÆTTRAABBI ÆT GRANNBERG!

GRANNBERG: (áhugin er vaktur)
NEI, HVAT SIGA TYGUM?

VÆTTRAOMMAN: EG ÁTTI EINA TIP-TIP-TIP-TIP-VÆTTRAOMMU, OG MAMMUBEIGGI HENNARA ÆT JÓLFRÍÐ!

VÆTTRAABBIN: JA, Í ØLL TEY 1000 ÁRINI, EG HAVI VERIÐ VÆTTUR, HEVUR GRANNBERG VERIÐ EITT GOTT VÆTTRANAVN!

GRANNBERG: ER TAÐ SATT?

VÆTTRAPÁPIN: TAÐ ER EITT NAVN, VIT HAVA VERIÐ ERRIN AV!

VÆTTRAOMMAN: OG EITT NAVN HEVUR NÓGV AT TÍÐA!

GRANNBERG: JA, JÚ, TAÐ VISTI EG VÆL...
JÚ, EG MEINI, AT TAÐ HEVÐI EG ROKNA VIÐ, AT GRANNBERG VAR EITT GOTT NAVN! JA, SO GOTT, AT EG HAVI IKKI VILJ BRÚKT TAÐ SO NÓGV!

(BØRNINI smílast)

VÆTTRAOMMAN: JA, TAÐ ER EITT RÆTTULIGT JÓLANAVN!

GRANNBERG: JÓLANAVN, JA, JÚ VIST SO!

VÆTTRAABBIN: EITT NAVN, SUM ØLL VÆNTA SÆR OKKURT AV SERLIGA NÚ UM JÓLATÍÐIR!

GRANNBERG: JA, TAÐ ER PÚRA GREITT!

VÆTTRAPÁPIN: JA, TÍ ANNARS KAN TAÐ KOMA AT GANGAST ILLA!

GRANNBERG: GANGAST ILLA? Á JÚ, TAÐ HAVA VIT SÆÐ!

VÆTTRAOMMAN: EG HALDIÐ, AT VIT SKILJA HVØNNANNAN, HARRA JÓLFRÍÐ GRANNBERG.

(ØLL, bæði vættrar og børn bíða spent. GRANNBERG berjist við seg sjálvan, men tað góða sigrar)

GRANNBERG: JA, SJÁLVANDI! VIT ERU PÚRA SAMD!

(Teir gomlu vættrarnir nikka til hvønnannan, og børnini eru sera glað)

GRANNBERG: OG NÚ SKULU VIT HAVA JÓLAHUGNA!
FYRSTA SYNGJA VIT EIN JÓLASANG,
OG SÍÐANDI FER VÆTTRAABBIN SIGA OKKUM FRÁ ONKRARI GAMLARI JÓLASØGA. OG EFTIR TAÐ,
HAVA VIT - **JÓLAFRÍ**!!!

(BØRNINI gleðast)

NALLI: FÁA VIT ONKI AT ETA?

GRANNBERG: JÚ, SJÁLVANDI! TAÐ MUNDI EG GLOYMT! EG HALDI OKKURT MAN VERA INNI A LÆRARASTOVUNI! MEN FYRST SYNGJA VIT! TAKIÐ SÁLMABØKURNAR FRAM, BØRN. NUMMAR 73.

# GRANNBERGS JÓLABLUES

<u>Børnini:</u> Hann vildi fegin dáma jólini eins og vit
Men tað er sera torført, so vit missa skil og vit
Hann eitur Grannberg
Tað navn hann torga ei kann
Hann eitur Grannberg
Best hann annað navn sær tá fann
Ja, jólatíðin er bitt
<u>Grannberg:</u> Tí Jólfríð er jú navn mítt

<u>Børnini:</u> Pápin seldi jólatrø - hann var ein verri ein
Og jólasøgur dámdi hann og segði "very fine"
Og hann æt Grannberg
Tað navn hann keypt hevði sær
Hann hatar Grannberg
Tað navnið gav hann so tær
Og jólatíðin er bitt
<u>Grannberg:</u> Tí jólfríð er jú navn mítt

<u>Børnini:</u> Mamman var úr Svínoy, so stór og prúð og góð
Hon var so pen og hampulig, hon var so skilagóð
Og hon æt Grannberg
Tað navnið elskaði hon
Hann hatar Grannberg
Og flongdur bleiv hann um hann hevði gron
Nei, jólatíðin er bitt
<u>Grannberg:</u> Tí Jólfríð er jú navn mítt

<u>Børnini:</u> Um bara hann æt Hansen,
vildi hann elska hvørji jól
Hann vildi pynta vakurk, spæla jólasong við viól
Men hann er Grannberg
Oh, den jammur og róp
Hann eitur Grannberg
Oh, den jammur og róp
Og jólatíðin er bitt
<u>Grannberg:</u> Tí Jólfríð er jú navn mítt
<u>Børnini:</u> Ja, jólatíðin er bitt
<u>Grannberg:</u> Tí Jólfríð er jú navn mítt

# BYRJUNARSANGURIN HJÁ NISSUNUM

<u>Vættrarnir:</u>

Tá jólatíðin nærkast seg, tá vakna vit øll
Vit geispa og vit flenna sum øll onnur børn
Tí nú er summarlúrur av hesu ferð
Og klokkuljóð og kavaflykrur hóma vit her
Og nógv er tað at gera
Tá jólatíðin er
Vit skulu børnum hjálpa væl í hesi stóru verð

Niðurlag:

Vit byrja nú við jólahald og kátum lag
Tí nissusiður hetta er hvønn jóladag
Og tú kanst hoyra fagnaróp og vættrasong
Tá Nilli, Nalli, Nulli, Nolli fara í gongd

Vit halda til á loftinum sum vanligt er
Vit eta bæði rísingreyt og leskilig ber
Og undir loftið er ein skúlstova so fín
Har dreinggjabørn og gentubørn tey læra latín
Og er tað onkur har, ið vil gera tey so kedd
So koma vit og hjálpa tað vit eru ment

Niðurlag:

Vit byrja nú við jólahald og kátum lag
Tí nissusiður hetta er hvønn jóladag
Og tú kanst hoyra fagnaróp og vættrasong
Tá Nilli, Nalli, Nulli, Nolli fara í gong

Vit lova tykkum, at tit kunna pynta pent
Vit lova tykkum alt skal verða jólakent
Tí hóast Grannberg súrur er og lúnast tá
So kunnu vit gera mangt, sum hann ei má
Vit skulu arga leingi, so hann fær sær eitt shokk
At aldrig hann tá aftur fær av jólum nokk

Niðurlag:

Vit byrja nú við jólahald og kátum lag
Tí nissusiður hetta er hvønn jóladag
Og tú kanst hoyra fagnaróp og vættrasong
Tá Nilli, Nalli, Nulli, Nolli fara í gong

# NÚ ER JÓLINI KOMIN

## 1. partur

Svenn:

Nú ska mítt hjarta hangast upp
Ja, hetta er als einki "fupp"
Tí nú er alt í lagið
Ja, hóast Grannberg súrur gerst
Skal jól tó gerast gleðifest

Øll:

Ja, jólafest er byrjað!

Lena:

Eingil við trompet her er
Gloymt er tað sum hent er her
Tað vit nú kunnu gloyma
Ja, allur einglaskarin blítt
Hvør einstakur við orði sítt

Øll:

Ja, jólafest er byrjað!

Hanna:

Hygg, kramarhúsið er ov tómt

Hans:

Vit fylla í tað skulu skjótt

Hanna:

Tað eru vit øll samd um
Tað besta her í jólatíð
Er kramarhús við bommum í

Øll:

Ja, jólafest er byrjað!

Niels:

Ein vøkur stjørna skyggir hátt
Sum lýsti vakurt jólanátt
Men mín var ring at gera
Men hetta eydnaðist tó væl
og jólatíð er eydnusæl

Øll:

Ja, jólafest er byrjað!
Ja, jólafest er byrjað!

## 2. partur

**Sofus:**
Vit ikki mugu gloyma tað
at Jesupápi føddur var
í Betlehem eitt kvøldi

**Lis:**
Og einglalag av himni hátt
sang fyri Jesus jólanátt

**Øll:**
Ja, jólafest er byrjað!

**Greta:**
So minnast mugu vit hvønn dag
at vera hvønn dag fró og glað
og gleðast yvir lívið

**Lena:**
Nú kavin lagstur er á fjøll
Vi syngja nú i felag øll

**Øll:**
Ja, jólafest er byrjað!
Ja, jólafest er byrjað!

# NÚ KOMA JÓLINI

<u>Svenn:</u>

Eitt jólahjarta vakurt er - men helst eitt reytt og hvítt
Eg elski flættaríðini - og flætti heldur títt
Mítt hjarta bankar, tá eg fari í holt við glanspappír
Og brádliga so bankar jólahjarta mítt og spyr

<u>Øll:</u>

At jólapríði pyntar pent
Ja, hygg so hugnaligt
Og jólapríði sigur, at nú koma jólini

<u>Lena:</u>

Ein jólaeingil hvítur er, sum spælir á trompet
So vinarligt fortelur hann, hvat einaferð er hent
Og um tú lurtar eftir, tá hann spælir á sítt horn
So kanst tú hoyra jólagleði dalar niður her

<u>Øll:</u>

Ja, jólapríði pyntar pent
Ja hygg, som hugnaligt
Og jólapríði sigur at, nú koma jólini

Hanna:

Eitt kramarhús við hontak á, ja, tað er sera flott
Og innihaldið hjá tí er, alt tað sum er so gott
Tí tað skal fyllast upp við leskligum góðgæti
Og sjálvt um tað er ósunt góður siður tað tó er

<u>Øll:</u>

Og jólapríði pyntar pent
Ja, hygg so hugnaligt
Og jólapríði sigur at, nú koma jólini

<u>Niels:</u>

At flætta stjørnur er so ringt, tí tað er pilkaríð
So dugnaligir fingrar skulu til, og gandaríð
Men hóast tað er so skínur stjørnan vakurt jólanátt
Ja, fagur himin er so sjá, tá stjørnur glampa hátt

<u>Øll:</u>

Tí jólapríði pyntar pent
Ja hygg, so hugnaligt
Og jólapríði sigur at, nú koma jólini

# DRILLISANGURIN HJÁ NISSUNUM

<u>Tey gomlu:</u>

Tá vit lítil vóru bæði
Allar nissurnar tá læði
Tá vit royndi ein blíðan gera
Á hendan hátt ein boðskap bera

Lurtið børn, tit nissur kæru
Takið nú við hesi læru
Sum tann tjúkka bók vil bera
Royn nú tykkar' best' at gera

Tit nú eiga tørn at fara
Tit nú Grannberg skulu læra
So at jólahald kann verða
Royn nú tykkar' best' at gera

<u>Vættrabørnini:</u>

Vit nú royna okkar' besta
Hvussu vit í Grannberg festa
At hann blíður nú skal verða
Royna okkar' best' at gera

<u>Øll:</u>

Ofta arga vit við vilja
"Sodan" er jú vár familja
Vit jú altíð royna at gera
So at jólafest kann vera

Ofta arga vit við vilja
"Sodan" er jú vár familja
Vit jú altíð royna at gera
So at jólafest kann vera

MISSERNES GÅ-I-GANG-SANG - Side 8



## NU KOMMER JULEN SNART! - Side 14




## GRANBERGS JULEBLUES - Side 18



NISSERNES DRILLESANG - Side 32




NU ER JULEN HJEMME! - Side 40



Leif Maibom

INGEN JULEFERIE - MEN!

På loftet over skolen bor nissefamilien med nissebørnene: Nille, Nalle, Nulle og Nolle. Nisserne vågner langsomt - og lidt sent - op til årets gerning.
I skolen nedenunder møder vi en flok glade børn, der glæder sig til den kommende juleferie. MEN! Skolens nye enelærer Julius Granberg er anti-julemand i den mest negative forstand. Han hidser sig vældigt op over børnenes juleforberedelser i klassen og bliver så gal, at han vil inddrage børnenes juleferie - men så træder nisserne på loftet i aktion!

Undervejs i spillet er der indlagt nye sange og melodier - med noder bagest i bogen.

INGEN JULEFERIE - MEN! kan med fordel spilles af børn i alderen fra 10 til 14 år, og har man mulighed og lyst, vil det måske være en idé, at lade spillets få voksenroller blive spillet af "rigtige" voksne.

INGEN JULEFERIE - MEN! henvender sig især til børn i alderen 5 til 15 år, men iøvrigt også til barnlige unge og voksne ifølge med børn.

Fra 16-17 medvirkende og opefter.

Meginfelag áhugaleikara
Føroya

Teaterforlaget DRAMA

ISBN 87 7419 392 9